Smágentur

# HB-gentur vunnu greipuna




*HB er føroyameistari hjá smágentum. Aftan frá vinstru: Birita Mortansdóttir, Inga Remmel, Esther M. Petersen, Tórhild Holm, Barbara Mortansdóttir, Judith J. Eysturoy, Annika H. Nemvig, Helga Lervig og Annika Hansen, venjari Framman frá vinstru: Annika Mortensen, Jórun Reginsdóttir, Gunn Mohr Hentze, Bára Hansen, Elin Jacobsen, Sissal Høgnadóttir, Kára B. Jakobsen og Andrea Joensen.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Smágenturnar hjá HB hevur í ár vunnið greipuna, men í landskappingini bleiv alt avgørt í einum síðsta dysti millum HB og KÍ, har vinnarin vann FM.**

SMÁGENTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Smágentuliðið hjá HB hevur í ár vunnið greipuna. Alt byrjaði í summar, tá tær spældu seg í steypafinaluna, har tær skuldu møta einum av argasta kappingarneytunum, VB/Sumba. Her gjørdi HB bart og vann heili 7-0! Hetta gjørdist byrjanin til eitt flott kappingarár hjá HB.

Annika Hansen hevur verið venjari hjá smágentunum. Hon sigur, at tær hava havt eitt heilt ótrúliga gott kappingarár, og at genturnar hava verið raskar at møtt upp, bæði til venjing og dystir.

– Vit hava vant tvær ferðir um vikuna, og genturnar hava verið sera raskar at møtt upp. Um tær ikki hava kunnað vant, so hava tær altíð boðað frá í góðari tíð, og tað hevur havt stóran týdning fyri okkum. Foreldrini hava eisini gjørt eitt gott arbeiði við at koyra genturnar til dyst og venjing og við at bakka tær upp gjøgnum kappingina, og tað hava vit vera sera glað fyri, sigur hon.

### Hørð kapping við KÍ

Landskappingin hjá smágentunum hevur verið skipað sum vikuskiftiskappingar, har genturnar hava spælt tveir ella tríggjar dystir ímóti øðrum liðum hvørt vikuskifti. Áðrenn síðstu kapping stóð púra á jøvnum ímillum HBa og KÍa, og tí var klárt, at síðsti dysturin millum hesi bæði liðini fór at vera avgerandi fyri, hvørt teirra fór at vinna FM-heitið.

Hesi bæði liðini skuldu tó leika tveir dystir hetta vikuskiftið, og tað kundi hent seg, at annað teirra snávaði móti onkrum av hinum liðunum. Men so var ikki. KÍ og HB vunnu teirra fyrsta dyst, og so skuldi ein avgerandi dystur til fyri at finna føroyameistaran.

Aftur hesaferð gjørdi HB bart, og vunnu tær heili 5-1 á gentunum úr KÍ. Sostatt var greipan komin í hús, og stórur rómur og smágentunum hjá HB. Annika sigur, at viljin og hugurin hjá gentunum hevur gjørt, at tær hava rokkið so langt.

– Genturnar hava dámt sera væl at spælt, og tá vit hava eitt gott A-lið og eitt gott B-lið, so hevur tað verið ótrúliga stuttligt at verið venjari hjá hesum liðunum. Genturnar eiga stórt rós uppiborið fyri viljan og hugin, sum tær hava víst gjøgnum árið.



*KÍ smágentur vunnu silvur. Aftan frá vinstru: Maria Andreasen, Sofía Purkhús, Sølvá Andreasen, Ása K. Thomsen, Rúna Bjartalíð, Una Joensen og Kári Purkhús, venjari Framman frá vinstru: Svanna Eliasen, Lena Viðbjørg, Louisa Østerø, Jastrið Sivertsen. Fremst: Ella Petersen.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




*HB smágenturnar vunnu báðar dystirnar í seinasta umfarinum leygardagin. Fyrri dysturin var ímóti LÍF.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Smágentur**

**FM-bólkur - støðan**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1. HB | 14 | 13-0-1 | 51-7 | 39 |
| 2. KÍ | 14 | 12-0-2 | 48-10 | 36 |
| 3. VB/S | 14 | 9-1-4 | 13-18 | 28 |
| 4. AB | 14 | 6-1-7 | 17-22 | 19 |
| 5. Skála | 13 | 5-2-6 | 19-18 | 17 |
| 6. NSÍ | 14 | 5-1-8 | 12-27 | 16 |
| 7. LÍF | 14 | 2-1-11 | 6-64 | 7 |
| 8. SÍF | 13 | 0-0-13 | 0-0 | 0 |